# Útboðstreytir

um koyring av dialysusjúklingum til og frá Landssjúkrahúsinum

**Alment útboð**

Sbrt. Rundskriv nr. 9003 frá 1. Juli 2019 um keyp av vørum og tænastum

2022

**Bráðdepilin**
J.C. Svabosgøta 41-49, FO-100 Tórshavn, Tel. (+298) 304500 www.ls.fo

## Innihaldsyvirlit


1. Lýsing ... 3
2. Útbjóðingartilfar ... 3
3. Uppgávan ... 3
4. Krøv til góðsku og tænastu ... 4
5. Tíðarætlan ... 6
6. Spurningar til útbjóðingartilfarið ... 6
7. Tilboðið galdandi ... 6
8. Meting av tilboðum ... 6
9. Tillutarnartreyt ... 6

# 1. Lýsing

Sjúkraflutningstænastan á Landssjúkrahúsinum (SFT) bjóðar við hesum út alment koyringina til og frá Landssjúkrahúsinum (LS) við dialysusjúklingum.

Talan er um eina tænastuveiting við niðanfyristandandi treytum og tíðarfreistum.

Landssjúkrahúsið heitur hervið á tykkara fyritøku um geva tilboð uppá omanfyristandandi uppgávu.

**Útbjóðingarháttur**

Útboðið verður framt sum eitt alment útboð í samsvarið við rundskrivið frá Fíggjarmálaráðnum *Rundskriv nr. 9003 frá 1. juli 2019 um keyp av vørum og tænastum*.

**Útbjóðari**

Landssjúkrahúsið (LS)
J.C. Svabosgøta 41-49
100 Tórshavn

**Kontaktpersónur**

Finn Bjarni Hentze Samuelsen
Felagsgoymslan
Fartelefon: 234595
Teldupostur: bjasa@ls.fo

Um tilboðið verður latið persónliga, skal tað latast Finn Bjarni Hentze Samuelsen, Felagsgoymslan.
Alt samskifti millum útbjóðara og tilboðsgevara skal vera á føroyskum.

Tilboðið skal fylgja ásetingunum í hesum tilfari.

Um skjøl og annað vanta í tilboðnum, kann hetta føra við sær, at tilboðið ikki verður tikið við í tilboðsviðgerðina.

Ordragevari tilskilar sær rættin til ikki at taka av nøkrum tilboði.

Avtalutíðarskeiði er 1 ár við optiónsmøguleika at leingja sáttmálan í 2 x 1 ár. Avtalan kann í serligum føri sigast upp í avtalutíðarskeiðinum við 3. mánaðar freist. Um álvarslig brot verða framd, so kann avtalan sigast upp uttan ávaring.

# 2. Útbjóðingartilfar

Tað samlaða útbjóðingartilfarið fevnir um:

- Útboðstreytir
- Skrivligir spurningar og aftursvar til útbjóðingartilfarið
- Fylgiskjal 1 – boðskjal

# 3. Uppgávan

Talan er um koyring av dialysusjúklingum, sum av heilsuávum hava tørv á flutningi til og frá LS. Málbólkurin er persónar sum eru búsitandi í høvuðsstaðnum, og um persónar á bygd har landfast er millum LS og bústaðin hjá sjúklinginum. Koyringin fevnir sostatt ikki um

sjúklingar úr Suðuroy, Sandoy ella útoyggj. Tó verður Sandoy partur av koyringini, tá Sandoyartunnilin er tikin í almena nýtslu.

Av tí at talið av sjúklingum ið hava tørv á dialysu á LS er skiftandi, so er koyringin eisini skiftandi. Túratalið og veglongdir broytast, so hvørt sjúklingar leggjast aftrat ella fella frá. Samlaða km-talið liggur vanliga millum 8.000 km og 10.000 km um mánaðin.

Í skrivandi løtu fevnir dialysukoyringin um 12 sjúklingar ið búgva uttanfyri Tórshavn og 2 sjúklingar ið búgva í Tórshavn.

Talan kann vera bæði um sitandi sjúklingar og sjúklingar í koyristóli.

Dialysusjúklingarnir eru yrkisdagar býtir upp í 2 bólkar. Morgunbólkurin skal møta á LS kl. 8:45 og kvøldbólkurin skal møta á LS kl. 14:45. Í vikuskiftum verður bert møtt á LS kl. 8:45.

Dialysuviðgerðin tekur umleið 4 tímar.

Í skrivandi løtu sær vikuætlanin soleiðis út *(bygdar/býar-nøvnini umboða hvar sjúklingurin verður heintaður)*:

Mánamorgun: Klaksvík x 2 – Norðagøta
Mánakvøld: Oyndarfjørður – Viðareiði – Tórshavn

Týsmorgun: Sørvágur x 2 – Miðvágur – Sandavágur – Vestmanna - Tórshavn
Týskvøld: Haldórsvík

Mikumorgun: Klaksvík x 3
Mikukvøld: Tórshavn – Oyndarfjørður

Hósmorgun: Sørvágur x 2 – Miðvágur – Sandavágur – Vestmanna
Hóskvøld: Haldórsvík – Tórshavn

Fríggjamorgun: Klaksvík x 2 – Norðagøta
Fríggjakvøld: Viðareiði – Klaksvík – Tórshavn

Leygarmorgun: Sørvágur – Sandavágur – Vestmanna – Oyndarfjørður

Sunnumorgun: Klaksvík – Haldórsvík – Tórshavn

Hetta broytist javnan og er ein partur av hesi tænastuveiting ið veitarin skal taka hædd fyri.

Innkeypsavtala verður gjørd grundað á útbjóðingartilfarið og innkomin tilboð.

Tilboðsgevarin er bundin av sínum tilboði.

Tølini í tilfarinum eru grundað á miðaltøl fyri seinasta ársfjorðingin og eru støðugt veksandi.

# 4. Krøv til góðsku og tænastu

Talan er um koyring av sjúklingum ið hava tørv á hjálp í samband við koyringina til og frá Landssjúkrahúsinum. Veitarin skal hjálpa øllum sjúklingum inn og út av bilinum og hjálpa til at bera viðføri/ognir. Haraftrat skal veitarin hjálpa sjúklingum við teirra hjálpartólum.

Starvsfólk hjá veitarinum skulu vera tænastusinnaði og veita eina tænastu har sjúklingar verða viðfarnir við virðing.

Veitarin skal hava eina telefontænastu, so at samband kann fáast við viðkomandi allar dagar har koyrt verður. Har kunna koma broytingar í koyriætlanina eitt nú avboð vegna sjúku o.a., sum krevur at veitarin kann røkkast via telefon.

Krøv til veitara eru:

- at akfør eru tøk til ásettu tíðirnar, eisini um akfar er á verkstað. Ábyrgd hjá veitara at seta annað akfar í staðin, so at koyringin ikki verður tarna
- at koyringin verður lagað til viðgerðartíðirnar, ið kunnu broytast leypandi

Krøv til akfør eru:

- akførini skulu vera egna til endamálið
- akførini skulu vera í góðum standi
- akførini skulu lúka neyðug krøv til slíka tænastukoyring
- akførini skulu vera væl hildin, rein og nosslig
- akførini skulu hava neyðuga hitaskipan og luftreinsan
- akførini skulu vera roykfrí
- akførini skulu hava neyðuga fyrstahjálparútgerð og eldsløkkjara
- akførini skulu hava avlamislyftu
- akførini skulu hava pláss til hjálpartól hjá sjúklingum
- akførini skulu hava pláss til sjúklingar í koyristóli
- akførini skulu tryggja at trygdarbelti eru tøk bæði til vanligt brúk og til sjúklingar í koyristóli. Bilførarin hevur ábyrgd av, at sjúklingar eru fastspentir áðrenn koyring
- Motorurin á akfarinum skal ikki koyra í tómgongd meira enn neyðugt

LS tekur sær rætt til at skoða akførini, um ivamál eru, ella hetta verður mett neyðugt.

Krøv til bilførara eru:

- skal hava koyrikort til akfarið ið verður brúkt til tænastuna
- skal vísa vinsemi, tolsemi og virðing
- skal virða tagnarskyldu í- og eftir avtalutíðarskeiði
- skal taka neyðug fyrilit og ýta neyðuga hjálp, so at tænastan verður avrika skilabest fyri hvønn einkultan sjúkling
- skal kunna handfara útgerð í akfarinum
- skal ikki avgreiða privatar telefonsamrøður tá sjúklingar eru í bilinum
- skal vera nossligur og væl røktur í tænastu
- skal hava gildugt fyrstahjálparskeið
- skal duga at hjálpa sjúklingum við niðursettum førleikum

Um neyðugt, so kann LS kalla inn veitaran til prát um hvussu starvsfólk skulu fara við sjúklingum og kunna um hvussu tænastan skal vera. Slíkur statusfundur verður á skrá við avtalubyrjan, men hartil í avtalutíðarskeiðinum eftir tørvi.

Ætlan fyri koyringina verður løgd til rættis av veitara, men í samráð við LS við avtalubyrjan. Síðani hevur veitarin ábyrgdina av koyriætlanini og at kunna skjalprógva via eini koyriæltan hvussu koyrt verður. Veitarin skal viðleggja rutuplan fyri koyrdar km hvønn mánað og annars eftir umbøn frá LS. Veitarin skal vera fyrireikaður uppá, at koyriætlanin kann broytast dag um dag, og at har kunna koma nýggja støð/ferðamál ávegis í avtalutíðarskeiðinum.

Í tí føri, at bilurin steðgar upp; bilførari gerst sjúkur ella líknandi støður uppstanda ið seinka tænastuni, so skal veitarin beinanveg syrgja fyri, at koyringin av sjúklingunum kann halda áfram. Um hetta ikki er gjørligt, so skal LS beinanvegin fráboðast, og LS er heimilda til at skipa koyring við øðrum parti fyri rokning hjá veitara.

Umframt hetta verður kravt, at dialysusjúklingar eru á LS í góðari tíð, áðrenn viðgerðin byrjar. Bilførarin skal hjálpa sjúklingi í og úr bilinum, til og frá heiminum og til og frá deildini G3 á LS. Eisini er týdningarmikið fyri tænastuna, at talan er um støðugar bilførarar. Tískil er tað eitt krav, at tilboðsgevarar upplýsa, hvussu samansetingin av bilførarum er. Jú færri og støðugari bilførarar, jú betur verður tænastan vigað/vektað.

# 5. Tíðarætlan

| | |
|---|---|
| Kunngerð av útboðstilfarið | 9. juni 2022 |
| Spurnarfreist * | 17. juni 2022, kl. 12.00 |
| Tilboðsfreist | 23. juni 2022, kl. 12.00 |
| Vinnarin verður kunngjørdur | Juni 2022 |
| Avtalubyrjan | 1. september 2022 |

Tilboð, ið eru latin inn ov seint, verða ikki tikin við í tilboðsviðgerðina.

Viðmerk tilboðið "*Útboð um koyring av dialysusjúklingum*".

# 6. Spurningar til útbjóðingartilfarið

Um tað eru viðurskifti ella krøv, sum tykjast ógreið, órímilig, torfør at uppfylla ella lýst á ein ófullfíggjaðan hátt, mælir LS til, at tilboðsgevarar seta spurningar til útbjóðingartilfarið.

Møguligir spurningar til útbjóðingartilfarið skulu sendast skrivliga við telduposti til bjasa@ls.fo so tíðliga sum gjørligt, tó innan hin 17. juni 2022 kl. 12:00.

Spurningar verða svaraðir skrivliga í seinasta lagi tann 18. juni 2022. Spurningar og svar verða almannakunngjørd í navnleysum sniði á Keypsportalinum.

# 7. Tilboðið galdandi

Tilboðið skal vera galdandi í minsta lagi 3 mánaðir frá at tíðarfreistin er farin.

# 8. Meting av tilboðum

Fyrst verður kannað eftir, at tilboðsgevari lýkur krøvini í útbjóðingartilfarinum og hvat tilboð verður latið uppá.

Síðani verður mett um hvørt bilurin(arnir) hóska til endamálið.

Samlaði tilboðsprísurin verður síðani samanborin millum teir veitarar, ið lúka krøvini í útbjóðingartilfarinum.

Tilboð, sum ikki lúka krøvini, verða ikki tikin við í viðgerðina.

Avtalan verður bjóða tilboðsgevara við lægsta prísinum treyta av, at tilboðsgevari lýkur krøvini í útbjóðingartilfarinum.

Um LS metir, at einki tilboð er nøktandi, tilskilar LS sær rætt til ikki at taka av nøkrum tilboði.

# 9. Tillutarnartreyt

Tillutarnartreytin er lægsti prísur. Við tillutarnartreytini skal skiljast tilboði við tí lægsta samlaða nettoprísinum.

Tá veitari letur inn tilboð verður boðskjal at nýta. Boðskjalið liggur sum fylgiskjal á Keypsportalinum. Boðskjalið er uppsett so, at arkini "Tilboðsgevari", "Prísur" og "Góðska og tænasta" skal útfyllast.

Tilboðini skulu upplýsa krónuprís fyri hvønn kilometur, íroknað allar aðrar útreiðslur herundir m.a. ómaksgjald, tryggingarútreiðslur og líknandi. Tilboðsprísurin skal innihalda allan kostnað, sum hevur við tænastuveitingina at gera.

Haraftrat skal veitari viðhefta frágreiðingarskjal við upplýsingum um, hvussu veitari lýkur krøvini til góðsku og tænastu í útbjóðingartilfarinum (petti 3). Max 5 síður.